DAGSINS MEINING

Forsetavalið í USA

Forsetavalið í USA nærkast í stórum, og tað er ikki ov nógv sagt, at allur heimurin bíðar við spenningi eftir úrslitinum. Hetta er ikki løgið, tí síðan Kalda kríggið endaði og Múrurin fall, hevur USA verið heimsins einasta og sterkasta supermakt. Eftir yvirgangsatsóknina á USA fyri nøkrum árum síðan hevur USA meira enn nakrantíð áður átikið sær leiklutin sum heimsins politistur. Fremstu dømini um henda politikk eru kríggini í Afghanistan, í Irak og harðrenda støðan mótvegis palæstinum í Miðeystri. USA undir Bush fyristingini hevur býtt heimin upp í lond, sum eru fyri og sum eru ímóti USA.

Spurningurin er, um heimurin er vorðin tryggari undir Bush, ella hann er vorðin ótryggari. Spurningurin er, um heimurin framyvir verður tryggari við Bush sum forseta ella gongdin verður hin øvugta. Tað er tí ikki líkamikið, hvør, ið verður valdur á forestavalinum í næstu viku. Hetta val fer at hava við sær fylgjur, tað veri seg positivar ella negativar, fyrst og fremst fyri USA, men eisini fyri allan heimin og sostatt eisini fyri okkum, sum búgva í Føroyum.

Bush er forsetin hjá teimum konservativu og hjá teimum vælbjargaðu. Hann er framum alt maðurin hjá big business og hjá hervaldinum. Hann gevur teimum ríku skattalættar og hann avmonterar tað sindrið av vælferðarsamfelag, sum er eftir í USA. Um Bush verður valdur, so fer hann eisini at tilnevna einar 4-5 nýggjar hægstarættardómarnar. Hægstirættur í USA hevur stórt politiskt vald. Tað er t.d. hægstirættur, sum ger av, um deyðarevsing framhaldandi skal vera galdandi revsing í USA. Valið fer tí at hava avgerandi ávirkan á framtíðina hjá USA. Uttanríkspolitikkurin hjá Bushstjórinini hevur verið merktur av stríðnum móti yvirgangi. Synd er at siga, at hesin politikkur hevur hepnast væl. Yvirgangurin og harðskapur standa við og versna, og heimurin er neyvan vorðin tryggari, meðan Bush hevur rátt fyri borgum.

Hitt valevnið, John Kerry, stendur fyri einum øðrum politikki. Hesin politikkur fevnir um vælferðarsamfelag og um ein skilabetri trygdarpolitikk, har dentur verður lagdur á hetta at vinna álitið á USA aftur serstakliga í Europa. Amerikanskur politikkur kann mangan vera torfør at skilja og trupult kann vera at síggja munin á flokkunum. Men til hetta valið er øðrvísi. Tað man vera rættiliga innlýsandi fyri flestu europearum, hvat valúrslit, ið gagnar Europa og heimssamfelagnum best.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Við góðari leiðslu ber so nógv til

Katrin Dahl Jakobsen
Valevni Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð

VAL04

Tað boðar frá góðum og umfatandi samstarvi í nýggja býráðnum, um so er at skrivingarlagið nú upp undir kommunuvalið er eftirfarandi. Og tað er tað helst, mugu vit vóna. Tað tykist vera lættari at finna tað, valevni eru samd um heldur enn tað øvugta.

Øll halda, at tað er út av lagi, so dýrt tað er at útvega sær bústað í Havn.

Øll halda, at tey gomlu eru so skammiliga forsømd. (Allir politisku flokkarnir **áttu at hildið**, at Tórshavnar kommuna burdi gingið á odda júst á hesum øki, havandi í huga figgjarliga fyrimunin vit hava við okkara aldursbýti, í mun til smærru kommunurnar, sum uppá seg hava nógv fleiri eldri fólk)

Øll halda, at kommunan skal vera rúmlig antin tú ert barn, ung, gomul, frísk ella sjúk.

Øll halda, at umhvørvið hevur al stóran týdning.

Øll halda, at mentanin skal hava góð kor.

Øll halda, at bøtt eigur at vera um vinnuligu karmarnar. o.s.v.

Jú, semjurnar eru lættar at fáa eyga á, so mikið ítøkiligur sum kommunupolitikkur í veruleikanum er, og so nógv minni sjónligur partapolitiski skilnaðurin vísir seg at vera, enn var tað løgtingsval. Skilnaðurin er kanska heldur størri millum kynini, enn hann er millum flokkarnar. Innast inni hevði býráðspolitikkur helst staðið sterkari, um býráðið í størri mun stóð sum ein maður/kona.

Og tó. Munur vil altíð vera í raðfestingum. Men mest av øllum, so er lítil nytta í semjum, um so er at tann, ið slóðar fyri kemur øllum í óføri, tí fyrisitið verður ikki eftir lógini, og rættartrygdin hjá borgaranum sostatt hótt. Eisini hesum fer Javnaðarflokkurin at fáa skil á.

Ídnaðarøkið í Kollafirði

Hans Jákup Simonsen
Valevni fyri Javnaðarflokkin til Tórshavnar Býráð

VAL04

Ídnaðarøkið á Oyrareingjum hevur at kalla ikki verið brúkt til ætlaða endamálið nakrantíð. Tað er bæði synd og stór skomm, at økið bert liggur og samlar órudd, og vil eg arbeiða fyri, at økið verður brúkt til arbeiðsskapandi virksemi. Tó eiga vit ikki at brúka økið til hvat sum helst.

Tað frættist, at ætlanin er at leggja eina bingjuhavn inni á Oyrareingjum. Hví er tað so umráðandi at brúka økið til bingjuhavn? Hevði ikki verið skilabetri at brúkt økið til vanligan ídnað, ið kundi givið fleiri arbeiðspláss?

Eg haldi, at tað er sera umráðandi, at man ikki ger nakað, sum skemmir bygdina ella kvettir bygdina av um tvøran. Hví ikki lata økið til vanligan ídnað og kanska útskriva eina kapping, um hvussu økið kann gerast liðugt, uttan at oyðileggja umhvørvið rundanum? Vit mugu minnast til, at hetta liggur millum sethús, og tí er altumráðandi, at man ikki í óðum verkum fer at spreingja seg inn í alt upplandið og gera eitt óneyðugt sár í bygdina.

Eitt hugskot til tungan ídnað ella bingjuhavn kundi upp á sikt verið at farið út um bygda økið, sum man eisini tosaði um í einari gamlari ætlan fyri Kollafjørð.

Lat okkum hyggja at, hvussu økið kann brúkast best, uttan at oyðileggja nærumhvørvið, heldur enn at stara okkum blind í núverandi ætlan um bingjuhavn.

Kommunan fyri øll

Jói Winther
Valevni hjá Javnaðarflokkinum í Tórshavnar kommunu

VAL04

Hetta eru nøkur av teimum málunum eg vil arbeiða fyri.

Betri bussleið: So ungdómurin kann koma tryggur til hús um vikuskifti.

Betri umstøður fyri ítróttin á Argjum og har í kommununi brúk er fyri tí.

Tær best møguligu umstøðurnar fyri vinnulívið.

Havnaviðurskifti: Skapa góðar umstøður fyri útróðurin.

Hjálpa teimun sum hava hugskot til nýggj arbeiðspláss.

Hjálpa og gera tað besta, allastaðni brúk er fyri tí.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Aftursvar til Poul Michelsen

Plastblómur ella ikki – tað er ætlanin við blómunum, ið hevur týdning!

Marianna Heinesen
Valevni Tjóðveldisfloksins til býráðsvalið

VAL04

Tað frøddi meg almikið, at mín grein gav eitt so skjótt aftursvar! Men líka ein rætting.

Persónliga eri eg ímóti at bólka fólk, soleiðis skilt, at vit m.a. hava ein aktivan ungdóm, dovnan ungdóm, krevjandi ungdóm, ein sunnan ungdóm, o.s.fr. Hetta verður tíverri gjørt, líka sum Poul bólkar meg í ein *lítlan bólk, ið ongan hug hevði at virka undir teimum fyriskipaðu frítíðarfelagsskapunum*. Her er rættingin. Eg var aktivur limur í Havnar Svimjifelag, Neistanum, B36, Fleyr, Fimleikafelagnum Ljósinum og nøkur ár hjá teimum gráu skótunum hjá Herinum, ein stóran part av mínum ungdómsárum.

Men tað, sum er áhugavert í hesum er, at tey fyriskipaðu frítíðarfelagsskapirnir hava eitt endamál at náða. Tað, sum sermerkir eitt ungdómshús, er at ALLUR ungdómurin samlast har við hvør sínum áhugamálum og aktivitetum. Tey, ið eru virkin í fyriskipaðum frítíðarfelagsskapum og tey, ið ikki eru virkin. Eitt ungdómshús skal geva pláss og rúm fyri øll!! Tískil kann man ikki seta fyriskipaðu felagsskapirnir upp ímóti einum ungdómshúsi, og tað veit Poul líka so væl sum eg!

Málið er fleiri ungdómshús. Avbjóðingin er *hvussu*? Tjóðveldisflokkurin hevur í síni valskrá lagt miðvísar ætlanir um hvussu ein partur av avbjóðingini kundi verið nøktaður. Tað er ikki bara spurningur um figging og rakstur - tað **er** ein spurningur um at raðfesta íløgurnar!

Latið okkum saman fáa eina kommunu - har ungdómurin blómar - plastik ella ei - tað er ætlanin og endamálið, ið hevur týding!

Gott kommunuval!

Effektivur familjupolitikkur í Vági

Alvin Joensen
valevni fyri Javnaðarflokkin í Vági

Seriøsitetur, nej álvaratos..... Hvat bleiv av loysnini, sum Føroya Fiskavirking hevði fyri flakavirkið í Vági? Tað eru mong ár síðan at ein loysn skuldi finnast! Eg hugsi at ársverkini hesi árini tilsamans kunnu teljast á fingrunum. Eitt almennt partafelag sum fekk alt litið upp í hendurnar, uttan kostna...

Tað kann hugsast, at bygningurin er ein útreiðsla fyri felagið (landið) so hví ikki sleppa sær av við hann? Og samstundis givið vágbingum moguleika fyri at vinna pening og skapa arbeiðspláss? Meiri logiskt kundi tað ikki veri. Hví kann kommunan ikki ognartaka bygningin? Tað vil, at um tað hevði verið nakar vilji og áhugi frá politiskari síðu, so hevði flakavirkið í Vági verið í gongd. Men takka veri okkar' egnu monnum, og her verða ikki tiknir dagar í millum kommunu, løgting, flokk ella annað, so er tað ongin av teimum fólkavaldu fyri suðuroynna, líka so lítið sum fyri restina av landinum, sum eru verdugir at hava nakra leiðslu undir hond. Og dog! Har var ein buldribassi sum setti nakrar spurningar, tá burdi onkur blivi illa við, men nej.

Ellisheim í Vági, var tað eitt pustirúm hjá politikarunum fyri at sleppa undan at meiri var tosað um flakavirkið? Jú, jú, tað hevði verið gott at havt eitt ellisheim, eins og tað hevði verið gott at havt ein nýggjan miðnámsskúla. Hetta hava tey nógva staðni runt um í heiminum. Men... tey hava eisini arbeiðspláss, soleiðis at tá ið fólk hava nomi sær kunnleika í skúla, kunna arbeiða, og at enda fara á ellisheim. Sum ætlanin er her í bygdini, so verður ikki brúk fyri nøkrum av hesum plássum. Fólk fer aðrastaðni at nema sær kunnleika, arbeiða, og ikki er hugsandi at tey flyta aftur til Vágs bara fyri at slappa á ellisheim. Tað er líka sum ein tráður ið verður bundin í millum tveir pelar, klipp hann og royn so at fáa endarnar at røkka saman aftur. Mikið torført, ha?

Um eg havi ta stóru virðing fyri teimum ráðandi í hesum landi haldi eg ikki skal vera ein loyna! Enn hevur mann loyvi at gera sær sínar egnu tankar. Kannska vit koma upp í part nú tað ikki sær so væl út norðanfyri? Ja, ella kanska vit nú vera slepp heilt upp á fjall.

At kommunan so ikki hevur gjørt nakað, tað man vera tí, at familjupolitikkurin í Vágs kommunu er so sera effektivur!

Er Skúladepilin við Marknagil – ein kommunal uppgáva??

Egon Øregaard
Valevni fyri Fólkaflokkin

VAL04

Skúladepilin við Marknagil er ein av stóru nýhugsanunum í nýggjari tíð.

Tað er ein landsuppgáva at byggja og fíggja rakstur til teir skúlar, sum Skúladepilin kemur at rúma.

Tórshavn hevur sum høvuðstaður landsins umframt, at hava skildu fyri borgarunum, sum búgva í kommununi, eisini til uppgávu at fjálga um alt Føroya fólk.

Við at gerast ein virkin partur í Skúladeplinum við Marknagili, kann Tórshavnar kommuna røkja hesa uppgávuna.

Hetta kann gerast við m.a., at kommunan, í Skúladeplinum, fær innivist fyri m.a.:

- Býarbóka- og KT savni, sum bæði næmingar, og vanligi borgarin kunnu gera nýtslu av
- Fyrilestrar og framførsluhøll, - sum m.a. kann gerast karmur um framførslur hjá eitt nú, musikskúlanum -
- Ítróttarhøllin í Skúladeplinum kann, aftaná skúlatíð, nýtast av øllum borgarunum í kommununi, - eitt nú hava fimleikarafeløgini stóran tørv fyri egnaðum hølum-,

Skúladepilin við Marknagil kann, á henda hátt, gerast ein mentunardepil í høvuðsstaðnum.

Her eru bert nøkur fá dømi nevnd, um kommunan gerst virkin partur í Skúladeplinum.

Hetta førir sjálvssagt fíggjarligar skildur fyri kommununa við sær. - men við hesum fæst nógv fyri samstarv millum land og kommunu.

Nýggj barnaverndarlóg – vónandi ein bati fyri børnini

Eyðgunn Samuelsen
formaður í sosialu nevnd Klaksvíkar býráð
heima.olivant.fo/~eydgunn

VAL04

Tað er gleðiligt at tað loksins sær út sum vit nú fáa eina nýggja barnaverndarlóg. Øll kunnu vera samd um at verandi lóg als ikki er tíðarhóskandi. Í samband við nýggju lógina eru fleiri spurningar ið ein kann tjakast um.

Tað fyrsta er, um ein skal hava leikfólk í barnaverndarnevndum ella ikki. Mín áskoðan er, at tað er rætt at hava leikfólk í nevndunum, tí málini eiga at vera so væl viðgjørd og fakliga undirbygd, at ein og hvør eigur at kunnað taka støðu. Eitt annað, ið eisini talar fyri hesum er, at uppgávurnar hjá nýggju barnaverndunum verða meira av fyribyrgjandi slag enn nú, og at mál ið viðføra tvingsul ikki vera avgjørd í barnaverndini á staðnum. At pláss verður til fyribyrging er sera gleðiligt.

Í samband við tvingsilsmál, so skal ein høvuðsbarnavernd fyri alt landið taka avgerð, hetta er til at liva við. Tað ið er altavgerandi í hesum sambandið er, hvør skal útinna avgerðina lokalt ? verður tað ikki lokala umsitingin men nýggja barnaverndarstovan undir Almannastovuni so verður tað eitt stórt aftursteg fyri brúkaran í Klaksvík og aðrastaðni við har ekspertisan er uppbygd. Vónandi verður hetta tikið til eftirtektar.

Ein annar spurningur er, um tað er rætt at lóggeva so, at lokal- og landspolitikarir ikki kunnu sita í barnaverndini. Politikarir eru valdir at skapa karmar og í minni mun at taka støðu í persónsmálum. Eisini kann tað vera løgið, sum politikari fyrst at taka støðu í barnaverndini í einum málið í barnaverndini, fyri síðan at flyta seg hinu megin borðið og har skula útvega kostnaðin av avgerðini, ið tú tók fyrru ferðina. Persónliga hevði eg ikki sum politikari vilja sitið í eini barnavernd.

Tríði spurningurin er, um tað er rætt at noyða kommununnar at samstarva í størri økjum enn kommunueindin (1500 íbúgvar). Hetta haldi eg er rætt at gera, tí endamálið við lógini er at verja barnið og tryggja at tað fær eina so góða og forsvarliga viðgerð sum gjørligt, hetta er ikki í sama mun gjørligt í eini lítlari kommunu við 100 íbúgvum.

Omanfyrinevndu spurningar eru eftir mínum tykki væl greiddir í lógaruppskotinum. Spurningurin um barnaverndarstovuna og býtislykilin í samband við figgingina eru eftir mínum tykki minni væl avgreiddir. Tað er ikki heppi, at leggja barnaverndarstovuna sum eina deild av almannastovuni táið verðuleikin er, at hesin førleiki í dag er bygdur upp í fleiri kommunum: Tórshavn, Klaksvík og Runavík. Hví ikki byggja víðari á henda førleikan og leggja hesa stovuna í økir ella finna eina interkommunala loysn ?

Fíggjarligi spurningurin er sum tað ljóðar, at lækka landsskattin og hækka kommunuskattin. Henda loysn hevur fleiri vansar við sær millum annað at kommunuskatturin hevur eina sosiala slagsíðu í mun til progresivu landsskattaskipanina. Hetta vísti javnaðarflokkurin fleiri ferð á síðst hetta lógaruppskotið var frammi so eg vóni at flokkurin vil taka hædd fyri hesum í lógaruppskotinum.

Samanumtikið er lógin tó ein munandi bati, serliga táið hugsa verður um rættartrygdina hjá børnum og foreldrum. Ásett er í lógini at hon skal endurskoðast um 5 ár, vónandi verður hetta gjørt og møgulig brek rættaði til tað tíð.